# Hetta er mín jólasangur

## Heri Ellingsgaard: *O holy night / Heilaga nátt*



**HUGNIN**

*- "O holy night" er nú vorðið til tað sama sum "jól" í mínari verð. Tá lagið hoyrist, kemur hugnin, gleðin og jólakvirran heilt av sær sjálvum, sigur Heri Ellingsgaard úr Klaksvík*

### O holy night

O holy night! The stars are brightly shining,
It is the night of our dear Saviour's birth.
Long lay the world in sin and error pining,
'Til He appear'd and the soul felt its worth.
A thrill of hope the weary world rejoices,
For yonder breaks a new and glorious morn.
Fall on your knees! O hear the angels' voices!
O night divine, O night when Christ was born;
O night divine, O night, O night Divine.
Led by the light of Faith serenely beaming,
With glowing hearts by His cradle we stand.
So led by light of a star sweetly gleaming,
Here come the wise men from Orient land.
The King of Kings lay thus in lowly manger;
In all our trials born to be our friend.
He knows our need, to our weakness is no stranger,
Behold your King! Before Him lowly bend!
Behold your King, Before Him lowly bend!
Truly He taught us to love one another;
His law is love and His gospel is peace.
Chains shall He break for the slave is our brother;
And in His name all oppression shall cease.
Sweet hymns of joy in grateful chorus raise we,
Let all within us praise His holy name.
Christ is the Lord! O praise His Name forever,
His power and glory evermore proclaim.
His power and glory evermore proclaim.

– Fraklendingurin Adolphe Charles Adam (1803-1856) gjørdi lagið í 1847 til yrkingina "Minuit, chrétiens" eftir Placide Cappeau (1808–1877), eisini úr Fraklandi. Hetta er kanska eitt tað mest spælda, umsetta og tilrættalagda jólalagið yvirhøvur, sigur Heri Ellingsgaard í Klaksvík.

Fleiri enskar yrkingar og týðingar finnast, men orðini " O holy night! The stars are brightly shining...", eru nokk tey mest kendu. Í Føroyum eru eisini fleiri týðingar og innspælingar av lagnum. Flestu hornorkestur hava lagið á skránni og vit hava sanniliga eisini arbeitt við tí í Klaksvíkar Hornorkestri.

"O holy night" er nú vorðið til tað sama sum "jól" í mínari verð. Tá lagið hoyrist, kemur hugnin, gleðin og jólakvirran heilt av sær sjálvum. Lagið er ikki so einfalt sum jólaløg ofta eru, men er heldur meira ein avbjóðing til bæði sang, orð og tónleik. Tað er friðarligt, men eisini dramatiskt.

– Hópurin av útgávum finnast, t.d. við Celine Dion. Besta løtan eg minnist við hesum lagnum, var tó tá Eivør sang lagið á eini jólakonsert í eini fullsettari Christianskirkju fyri nøkrum árum síðani. Tá var ikki eitt eyga turt, sigur Heri Ellingsgaard.

---

# Jólini heima hjá Rósu

## - Jólini, eins og páskir og hvítusunna er nakað serstakt hjá okkum, sigur landsstýriskvinnan, Rósa Samuelsen.

Familjan er saman, og vit hugna okkum, eins og farið verður á gólvið hjá familju. Ongar smákøkur blíva bakaðar longur, fyrr vóru fleiri sløg, men tað má so bíða til betri stundir eru.

Tað mest umráðandi er at familjan er saman.

Jólaaftan verður drýlur bakaður. Hann verður etin á middegi, saman við egg og sild, skerpikjøti, rullupylsu, laksi og rækjum. Ein løta vit øll gleða okkum til. Síðani verður farið út við teimum seinastu jólagávunum og vitjað í kirkjugørðunum.

Farið verður í kirkju í Sandavági kl. 17,00 og tá vit koma heim, er borðreitt við góðum røstum kjøti, eplum, gularótum og rótum úr ovninum. Vit goyma mandilrísið til jólagávurnar eru pakkaðar upp.

Tað er sera hugnaligt at lurta eftir Kringvarpinum, tá tosað verður við fólk sum halda jól uttanlands, serliga við sjómenn, sum halda jól á havinum.

Maðurin hevur fleiri jól verið burturi. Nakrar ferðir hevur verið tosað við hann, so vit vita hvussu

**FYLGJA VIÐ**

*– Vit vita, hvussu tað er at fylgja við hjá teimum, sum heima eru og merkja saknin eftir einum sum er burturi á jólum, sigur Rósa Samuelsen*



tað er at fylgja við hjá teimum, sum heima eru og merkja saknin. Á midnátt verður lurtað eftir kirkjugongdini í katólsku kirkjuni, sum altíð er stak hugnaligt.

1. Jóladag er gás til døgurða, sum er frá egnum farmi. Onkuntíð hava vit roynt at skift um og etið gás jólaaftan, men vit eru samd um, at ræsta kjøtið er tað rætta jólaaftan.


